

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 11 - 2011

# Úr at gera í norsku oljuvinnuni komandi árini

Skulu vit trúgva analytikarunum í norsku fyritøkuni Rystad Energy verður virksemi og arbeiði til nógvar hendur í norsku oljuvinnuni komandi 10 árini. Serliga verður hugsað um veitarar til oljuvinnuna, sum kunnu síggja fram til eina ljósa framtíð. Vit standa fyri at skula gera 20-25 nýggjar oljupallar og 60 til 70 havnbotnsútbúnaðir fram til 2020, sigur Jarand Rystad við Offshore.no. Ætlanir um útbyggingar av Gudrun, Valemon, Eldfisk 2 og Ekofisk suður liggja longu á arbeiðsborðinum. Aftrat hesum eru fleiri aðrar útbyggingar. Endurútbyggingar av gomlum risum kunnu eisini koma at merkja bygging av fleiri pallum m.a. til Snorre og Gullfaks. Haraftrat kemur gimsteinurin Aldous/Avaldnes. Og enn fleiri, eitt nú í Barentshavinum. Avbjóðing Útrokningarnar hjá Rystad Energy vísa, at tað fram til 2020 skulu útbyggjast oljukeldur, sum goyma eina milliard tunnur um árið. Við einum útbyggingarprísi uppá umleið 17 dollarar fyri tunnuna verður talan um at gera íløgur fyri íalt 95 milliardir krónur um árið. Hetta kemur aftrat íløgum og rakstrarkostnaðum, sum í ár eru uppá 220 milliardir krónur. Fyri veitararnar av vørum og tænastum til hesar útbyggingar fer eftirspurningurin at vera størstur í 2016 uppá 340 milliardir krónur. Uppá fyrispurning um ídnaðurin fer at klára at nøkta eftirspurningin sigur Jarand Rystad, at tað fer at vera torført men vøksturin hevur fyrr verið eins stórur. Elefanturin Hann nevnir eisini seinasta oljuelefantin. Hesin fer at tørva fleiri pallar fyri einar 100 milliardir. Henda útbygging kann samanberast við Gullfaks og Oseberg og verður mett, at útbyggingin kann gerast fyri minni enn 10 dollarar tunnuna. Rystad er so mikið bjartskygdur um Aldous/Avaldsnes fundini, at tey kunnu enda við at vera uppaftur størri enn higartil mett uppá 1,7 til 3,3 milliardir tunnur. Fundini kunnu gerast tey størstu nakrantíð í norskari oljusøgu, størri enn Ekofisk og Statfjord. Føroyskir handverkarar í Noregi Í dag eru nógvir

føoyingar í norsku oljuvinnuni. Føroyaska fyritøkan Pam Offshore hevur í meira enn 10 ár leigað út føroyskar elektrikarar og sveisarar til arbeiðsuppgávur í norsku oljuvinnuni. Við umrøddu risastóru útbyggingum komandi 10 árini er ikki óhugsandi, at tað fara at vera enn fleiri møguleikar hjá føroyskum handverkarum at fáa arbeiði í norsku oljuvinnuni.